
Strategisk árinsmeting

Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervi



28. Januar 2026


Innihald

Innleiðing 4
Byggiplass 4
Grótgoymslur 5
Suðuroy 5
Skúvoy 5
Fyribils havn í Skúvoy 5
Vegir 6
Ferðsla 6
Tunnilslinja 6
Inntriv í Sandoy og Skúvoy 7
1A Tunnilsmunni í Djúpadali 7
1A-1 Byggiplass í Djúpadali 7
1A-2 Byggiplass til tunnil gjøgnum Traðarhamar/Sands Líð (vegaloysn a og b) 7
1A-3 Tunnilsvegur, Djúpidalur – Sands Líð 8
1A-4 Grótgoymsla í Djúpadali 8
1A-5a Vegaføring gjøgnum Sands Líð og Sands bygd (møguleiki a) 9
1A-5b Vegaføring gjøgnum Traðarhamar norður um bygdina (møguleiki b) 10
1A-5c Vegaføring eftir Traðarhamri (møguleiki c) 11
1A-6 Tunnilsmunni í Skúvoy 12
2B Tunnilsmunni norðanfyri Múlan 13
2B-1 Vegaloysn uttanfyri tunnilsmunna 13
2B-2 Grótgoymsla 13
2B-3 Byggiplass norðanfyri Múlan 14
2B-4 Byggiplass í Skúvoy 14
2C Tunnilsmunni sunnanfyri Múlan 15
2C-1 Vegaloysn 15
2C-3 Grótgoymsla 16
2C-4 Byggiplass 16
2C-5 Byggiplass í Skúvoy 16
Yvirlit yvir víddir og náttúru 16
Umhvørvi og ávirkan 17
Fuglar. 17
Við vegin við Stóravatn 17
Í Djúpadali 17
Múlin Við Kálvamannsrætt 17
Økið í Skúvoy 17
Ávirkan á Fuglar 17

Múlin ... 18
Skúvoy ... 18
Tunnilsmunni norðan ella sunnan Múlan. ... 18
Eftir Traðarhamri ella gjøgnum Traðarhamar. ... 19
Plantur ... 19
Vegagerð ... 19
Grótgoymsla og arbeiðspláss ... 19
Vatnrenslið í lendinum ... 19
Larmur. ... 19
Økisvernd ... 20
Lýsing og árinsmeting av ymisku linjuføringunum ... 21
Linjuføring 1A ... 21
Vegaføring 1A-5a vestanfyri Sands Vatn ... 21
Vegaføring 1A-5b eystan fyri Sandsvatn ... 21
Vegaføring 1A-5c eystan fyri Sandsvatn ... 21
Vegaføring frá Líðarenda til Djúpadal 1A (a-c) ... 21
Linjuføring 2B ... 22
Linjuføring 2C ... 22
Skúvoy ... 22
Linjuføring 1A ... 22
Linjuføring 2B og 2C ... 22
Meting ... 22
Skjalayvirlit ... 23
Viðfesti 1 Sandoy ... 23
Viðfesti 2 Skúvoy ... 23
Viðfesti 3 Sandsvatn ... 23
Viðfesti 4 Gróthúsvatn ... 23
Viðfesti 5 Samandráttur ... 23
Viðfesti 6 Vandametingar ... 23
Viðfesti 7 Trafiktal på Sandoy ... 23

Innleiðing

P/f Suðuroyartunnilin varð stovnað í november 2022 sum alment partafelag. Endamálið er sambært viðtøkunum §1:



P/f Suðuroyartunnil

Navn og endamál

§ 1

Navn felagsins er P/f Suðuroyartunnilin. Felagið er stovnað við heimild í løgtingslóg nr. 176 frá 21. desember 2021 um Løgtingsfiggjarlóg fyri fíggjarárið 2022.

Endamál felagsins er at gera undirsjóvartunnil millum Sandoy og Suðuroy við hartil hoyrandi vegagerð, at hava rakstur av tunlinum um hendi og at reka annað virksemi í hesum sambandi.

Verkætlanin er síðani avtalað til at umfata samlaðu vega- og tunnilsgerðina frá Sandoyartunlinum til landsvegin sunnanfyri Hvalba, umframt at tunnilssamband skal gerast millum Suðuroyartunnilin og Skúvoy.

Hendan strategiska áringskanningin er gjørd út frá tí vitan, sum finst í løtuni, og hon er gjørd av

Suðuroyartunlinum P/F:	Yvirskipaði viðurskifti ísv tunnils- og vegagerð
LBF:	Prosjektering og tekningar
William Simonsen v.fl.:	Náttúra og umhvørvi

Frágreiðingin er tvørfakliga granskað av øllum luttakarunum

Byggipláss

Neyðugt er vanliga við uml 40-60.000 kvm til byggipláss við munnarnar til undirsjóvartunlar alt eftir hvussu atkomiligt tað er við veitingum til byggingina. Eitt byggipláss er serliga aktivt í spreingitíðarskeiðinum, har roknast má við støvi, evju, runu, óljóði frá ventilatión, grótknúsing og ljósi. Eisini er vanliga ein millumgoymsla við tunnilsmunnan til grótið úr tunlinum, har tað verður vippað eftir hvørt skot, áðrenn tað verður grivið upp í lastbilar og koyrt víðari til endaligar goymslur ella aðrar verkætlanir.

Í miðal koma uml 4.000 m3 av gróti úr hvørjum tunnilsmunna um vikuna og í mesta lagi uml. 1.800 m3 av gróti úr hvørjum tunnilsmunna um samdøgrið, alt eftir hvussu arbeiðið gongur, og um sprongt bert verður ein veg. Um sprongt verður tveir vegir, t.d. suður og norð úr Skúvoy við atkomu úr sama holi, verður talan um uml. 8.000 m3 av gróti í miðal um vikuna.

Vanligar avbjóðingar ísv byggipláss er ljós, støv, larmur og runa. Sjálvt pumpuvatnið úr tunlinum ber til at leiða út á streymasjógv, men yvirflatuvatnið frá byggiplássinum og runa frá akførum, sum koyra út á almennan veg, ofta eru truplari at stýra fullkomiliga.

Í avgerðarnotatinum frá 20.10.2025 er grundgivið og mett um byggitíðina:

	Spreingitíð [ár]	Samlað tíð [ár]
1A úr Djúpadali	5,5	8,1
2B norðanfyri Múlan	4,9	7,3
2B í Skúvoy	3,8	7,3

Grótgoymslur

Grótgoymslur kunnu gerast á ymiskan hátt. Um ætlanin er at leggja grótið endaligt, verður grótið innbygt í lendið, og klætt við mold og sátt. Hesin háttur tekur størri øki.

Ein annar háttur er at leggja grótið í rúgvu, sum verður klædd við mold á sjónligu síðunum. Grótið kann síðani gagnnýtast yvir nøkur ár til aðrar verkætlanir og við tíðini blíva burtur. Á henda hátt skuldi tørvurin á at spreingja eftir fyllugróti í landinum verið minni, økið undir grótrúgvuni meira avmarkað og inntrivið yvir tíð minni.

Um byggipláss verður í Skúvoy, verður lagt upp til, at grótið verður siglt burtur so hvørt av fyribils havnarlagnum. Í sambandi við Sandoyartunnilin gjørdist greitt, at loyvi ikki fæst at tyrva grót í havið, og um útfylling á sjógv skuldi verið gjørd sum ein fyribils loysn, er hugsandi at stórur partur av fylluni vildi verið vaskaður út í brimi.

Suðuroy

Í Suðuroynni verður mett, at Suðuroyartunnilin má byrja í Sandvík orsaka av jarðfrøðiligum viðurskiftum. Kannað varð innleiðandi, um tunniln kundi byrja eystanfyri Sandvík, men tað fekst ikki at bera til, at fáa tunnilin nóg djúpt undir havbotnin við sjóvarmálan, um krøvini til hall á tunlinum skuldu haldast. Tí liggur tunnilsmunnin vestanfyri bygdina við einum stuttum vegateini tvørtur um dalin. Byggiplássið verður staðsett við munnan, og grótgoymsla so tætt við munnan sum tilber, alt í samráð við jarðareigarar, Kommununa og umhvørvismyndugleikarnar. Eftir øllum at døma eru avtakarar til avlopsgrótið í Suðuroy, og ætlanin er eisini at fylla grótbrotið í Hvalba uppaftur.

Í Hvalba er teknað ein vegaloysn rundan um bygdina, hús og fornminnir. Teknaði tunnilsmunnin í Hvalba liggur 41m yvir havyvirflatuni, og tilmælt verður ikki at leggja hann lægri orsaka av jarðfrøðini.

Skúvoy

Tunnilssamband skal gerast til Skúvoynna, og hetta kann gerast við at gera tunnil úr Suðuroyartunlinum og upp í Skúvoynna, ella at gera byggipláss í Skúvoynni og gera tunnil niður til Suðuroyartunnilin.

Um tunnilsmunnin verður lagdur norðanfyri Sands bygd, verður tunnilin millum Sandoynna og Skúvoynna so langur, at mett verður neyðugt at gera byggipláss og fyribils havn í Skúvoy.

Um Suðuroyartunnilin verður gjørdur úr Djúpadali, er higartil ikki mett neyðugt við byggiplássi og fyribils havn í Skúvoy. Um loyvi fæst at byggja og gera fyribils havn úr Skúvoy í mun til umhvørvi, kann hendan loysnin tó ikki útilokast sum ein møguleiki fyri styttra tunnilin úr Djúpadali, serliga um grótbrot kann gerast í oynni til ger av fyribils havnarlagi (loysn 1B).

Møgulig víðari vegagerð í Skúvoy og parkeringstørvur er ikki tikin við her, men tað verður uttan iva ein tørvur á parkeringsplássi og vegum eftir at tunnilssamband er komið. Eitt parkeringspláss krevur uml. 25 kvm fyri hvønn persónbil. Tvs at 100 bilar krevja uml. 2500 kvm. Harafturat verður neyðugt við plássi til bussar, vendipláss o.l. Tað er enn ikki greitt, hvar markamótið er millum tunnilsprosjektið og kommununa.

Fyribils havn í Skúvoy

Um loyvi fæst at arbeiða og gera havnarlag í Skúvoy, sum er brimpláss, er neyðugt at gera mola og eina ávísa fyllu út á sjógv at leggja millumgoymslu av gróti á. Tørvur er á at verja fylluna við verjugróti, um stórir partar av fylluni ikki skulu skola burtur á vetrartíð. Um loyvi fæst at gera grótbrot í Skúvoy og at spreingja eftir fyllugróti til fyrsta part av havnini, kann tað vera ein anleggstekniskur fyrimunur, so tað slepst undan at koyra o.u. 70.000 m3 av fyllugróti gjøgnum Sands bygd, fyri síðani at sigla tað út til havnagerð í

Skúvoynni. Roknast má við, at havnagerðin má ganga fyri seg í summarhálvuni, tá betri er í sjónum, og samstundis sum búfugklurin reiðrast.

Lagt verður upp til, at fyribils havnarlagið verður tikið burtur eftir liðugt arbeiði. Enn er tó ikki greitt, hvussu burturtøkan av øllum tilfarinum niður á 16m dýpi í hesum farvatninum skal skipast, samstundis sum arbeiðstrygdin eisini skal vera í lagi.

Vegir

Nýggir vegir verða sum heild gjørdir sum H1 vegir, við eini breidd á 9m íroknað vegøksl. Í útgangstøðinum eru vegskráarnir teknaðir við halli 1:4 og so vítt gjørligt uttan bilverju. í viðkvomum økjum er møguligt at gera loysnir, sum avmarka lendistørvin og sum avmarka larm, t.d. við at brúka tætta bilverju (h~0,9m) og skráa 1:1,5. Eisini ber til at finna loysnir sum forða fyri drening av økinum fram við vegnum. Um vegareglurnar loyva tí, ber vanliga eisini til at flyta vegaføringina nakað, um tað er til gangs fyri umhvørvið.

Ferðsla

Ferðslan í einum komandi Suðuroyartunli er í planleggingini av prosjektinum sett til 1400 bilar í miðal um samdøgrið tá tá tunnilin opnar. Í viðfesti 7 eru úrslit frá eini meting úr ferðslumodellinum hjá Landsverki 2021.

Til samanberingar koyrdu uml. 1100 bilar um samdøgri í miðal gjøgnum Sandoyartunnilin í 2025, og knapt 1300 í miðal í juli 2025.

Tunnilslinja

Í Sandoynni er upprunaliga gjørt eitt forprosjekt við tunnilsmunna í Djúpadali og vegi til Líðarenda. Talan er um stytstu tunnilsleið, um sæð verður burtur frá møguligum tunnilsmunna í Dali. Síðani forprosjektið frá 2023 var liðugt hevur verið politiskt ynski um at kanna fleiri møguleikar fyri linjuføring av tunli og vegum í Sandoynni. Talan hevur verið um tunnilsmunna í:

1A Djúpadali
- a. Vegaføring við tunli gjøgnum Sands Líð og Sands bygd norður um Múlan.
- b. Vegaføring gjøgnum Traðarhamar norður um bygdina
- c. Vegaføring eftir Traðarhamri
- d. Ikki tørvur á stórum byggiplássi og fyribils havn í Skúvoy

1B Djúpadali og í Skúvoy
- a. Er tað sama sum 1A tó við byggiplássi í Skúvoy og minni grótgoymslu í Djúpadali, , sum í 2B.

1C Djúpadali við vegi niðan um Lítlavatn.
- a. Er tað sama sum 1A, men vegasambandi millum tunnilsmunna og Líðarenda verður niðan um Lítlavatn. Loysnin er ikki uppteknað, men sær út til at bera til út frá topografiini. Longdin økist við hesi loysnini o.u. 1,6 km.

2B Norðanfyri Múlan
- a. Við byggiplássi og fyribils havn í Skúvoy
- b. Framtíðar vegur til Eysturbygdirnar - á leið sum fyri 1A-5a

2C Sunnanfyri Múlan við gamla Grótbrotið.
- a. Vegaføring norður um Múlan
- b. Við byggiplássi og fyribils havn í Skúvoy
- c. Framtíðar vegur til Eysturbygdirnar - á leið sum fyri 1A-5a.

Hesir møguleikar og yvirlit yvir ávirkan av øki verður viðgjørt hvør sær.

Hóast tað ikki verður partur av prosjektunum 2B og 2C, verður mint á, at um loysnirnar 2B ella 2C verða framdar, verður óiva neyðugt í næstum at dagføra vegaføringina til eystursíðuna av Sandoynni við teimum inntrivum tað hevur við sær. Ein mett ávirkan av vegi til eysturbygdirnar er tí tikin við í yvirlitið yvir ávirkaði økir.

Inntriv í Sandoy og Skúvoy

1A Tunnilsmunni í Djúpadali

Undirsjóvartunnilin til Suðuroyar er óvanliga langur, og í mun landið, er talan um eitt óvanliga stórt prosjekt, har prosjektváðin eigur at vera hildin so langt niðri, sum yvirhøvur tilber. Allarstørsti prosjektváðin liggur í sjálvum undirsjóvartunlinum, og leiðin úr Djúpadali til Sandvíkar er stytsta leið, um sæð verður burtur frá at byrja úr Dali.

1A-1 Byggipláss í Djúpadali

Byggiplássið við goymslum og arbeiðsvegum verður lagt í Djúpadali uml. 400m sunnanfyri Stóravatn og tunnilsmunnin uml 700m sunnanfyri Stóravatn. Byggiplássið er víst við reyðum á mynd 1.

1A-2 Byggipláss til tunnil gjøgnum Traðarhamar/Sands Líð (vegaloysn a og b)

Byggiplássið til tunnil gjøgnum Traðarhamar verður innleiðandi sett til 12.000 kvm, óansæð um talan er um tunnilin gjøgnum Sands Líð ella um tunnilin norður um bygdina, sí byggipláss við reyðum á mynd 2 og 3. Vegur eftir Traðarhamri hevur ikki tørv á hesum byggiplássinum.

1A-3 Tunnilsvegur, Djúpidalur – Sands Líð

Tunnilsvegurin frá tunnilsmunnanum í Djúpadali til Líðarenda verður so vítt gjørligt lagdur á verandi veg, ella í økið, sum er taðað fram við vegnum, fyri at taka so lítið av órørdum lendi og vátlendi á staðnum, sum gjørligt. Verandi vegur er uml 3m breiður uttan vegøksl, meðan nýggi vegurin verður 9m breiður íroknað vegøksl. Økið til vegagerð er víst á mynd 1 við grønum og er teknað út frá, at vegirnir hava flatar skráar uttan bilverju.




1. Ávirkað øki frá tunnilsmunna í Djúpadali til Líðarenda. IBA økið er blátt.

1A-4 Grótgoymsla í Djúpadali

Eftir ætlan verður grótgoymslan løgd so tætt við tunnilsmunnan, sum gjørligt, og so langt suðuri, sum til ber, fyri at koma burtur frá vátlendinum og fuglalívinum millum Stóravatn og Lítlavatn. Goymslan verður løgd soleiðis, at vatn ikki rennur frá grótgoymsluni oman í Stóravatn. Økið er soleiðis skapað, at plass er fyri nógvum gróti á lutfalsliga lítlum øki. Økið til grótgoymslu er víst á mynd 1 við gulum

1A-5a Vegaføring gjøgnum Sands Líð og Sands bygd (møguleiki a)


Hendan vegaføringin leggur til grund ein tunnil gjøgnum Sands líð á uml 1,1 km. Smærri tillagingar mugu gerast á verandi veg vestanfyri tunnilsmunnan í líðini. Verandi vegur verður síðani órørdur oman til brúnna við Sandarfløtt, har tilmælt verður av ferðslutrygdarávum at gera eina rundkoyring, har allur býlingurin í Trøðum verður bundin í. Vegurin eftir Sandarfløtti verður órørdur. Vestanfyri Sandarfløtt verður tilmælt at gera eina rundkoyring at binda Sands bygd í. Nýggjur Landsvegur verður síðani førdur niðanfyri bygdina og uppum Múlan og bundin í verandi veg norðanfyri meginskúlan. Við hesum verður verandi landsvegur fram við vatninum, millum bygdina og meginskúlan, vanligur bygdarvegur, og høvuðs ferðslan sleppur undan svingunum við Kálvs Rætt. Alternativt kann veljast at binda í verandi landsveg sunnanfyri Múlan. Teinurin vestanfyri Sands Vatn er teknaður í ein geira, sum er lagdur av til landsveg til Eysturbygdirnar. Økið til vegagerð er víst á mynd 2 við grønum.



2. Vegaføring 1A-5a við tunli gjøgnum Sands líð og vegi millum býlingarnar á Sandi. IBA økið er blátt.

1A-5b Vegaføring gjøgnum Traðarhamar norður um bygdina (møguleiki b)

Hendan vegaføringin leggur til grund ein 1,7km langan tunnil gjøgnum Traðarhamar, norður um býlingin í Trøðum. Tunnilin verður planlagdur bygdur úr erva og niður, so tað slepst undan byggiplássi við Sands vatn. Vegur má gerast frá tunnilsmunnanum fram við vatninum og norður um meginskúlan, har bundið verður í verandi landsveg. Vegurin kann tillagast síðuvegis í mun til umhvørvið, t.d. so langt frá vatninum, sum gjørligt, uttan at koma ov tætt uppá hamaran og møguleikan fyri møguligum omanlopi. Økið til vegagerð er víst á mynd 3 við grønari markering, og har vegurin teknaður í eini frástøðu á minst 40m til miðlinjuna á vegnum, og vegaskráarnir eru teknaðir við halli 1:4.



3. Vegaføring 1A-5b við tunli gjøgnum Traðarhamar og vegi eystanfyri Sands Vatn og norðanfyri í Trøðum. IBA øki er blátt.

1A-5c Vegaføring eftir Traðarhamri (møguleiki c)

Hendan vegaføringin leggur upp til ein veg eftir Traðarhamri norður um Sandoyartunnilin og sum verður bundin í vegin millum Skopun og Sandoyartunnilin. Við hesi loysnini, verður stórur partur av grótinum úr Suðuroyartunlinum brúkt til vegagerð. Vegurin vil í einum styttri teini liggja omanfyri 200m hædd. Síðuvegis ber til at tillaga vegaføringina stórstapartin av teininum, har topografiin og vegareglurnar loyva tí. Eisini er væntandi ein fyrimunur at gera vollar fram við vegnum í støðum, at t.d. vatn fíkur niðan móti vegnum frá fossum, ella har verjast annars skal fyri vindi. Økið til vegagerð er víst á mynd 4 við grønum.



4. Vegaføring 1A-5c við vegaføring eftir Traðarhamri. IBA øki er blátt.

1A-6 Tunnilsmunni í Skúvoy

Í loysnini við tunnilsmunna í Djúpadali, verður tunnilin til Skúvoyar bygdur úr Suðuroyartunlinum og upp til Skúvoynna. Tvs, at talan verður um eitt lítið byggipáss í Skúvoy ísv ger av inntakinum, sum væntandi kemur at liggja millum kirkjugarðin og tyrlupallin, og tunnilin má bindast í verandi veg. Inntak og vegur í Skúvoy, kann gerast uttanfyri reiðringartíð. Tað kann hugsast, at tað kann vera ein fyrimunur fyri arbeiðið, at hava ventilatorar við tunnilsmunnan í eitt tíðarskeið í byggitíðini. Økið til vegagerð er víst við grønum og byggiplass við reyðum á mynd 5.




5. Íbinding í Skúvoy ísv tunnilslinju 1A. Ramsarøkið er grønt. Fjørðan er IBA øki.

2B Tunnilsmunni norðanfyri Múlan

2B-1 Vegaloysn uttanfyri tunnilsmunna

Vegaføringin uttanfyri tunnilsmunnan krevur eina ávísa geometri smb. vegareglum, við frástøðum, radius o.l. fyri at binda verandi veg í tunnilsvegin. Uppteknað er ein møgulig loysn, sum verður mett at lata seg gera. Framtíðar vegagerð til eysturbygdirnar er ikki loyst, men hon vil óiva líkjast 1A-5a í einhvørjum formi. Økið til vegagerð er víst á mynd 6 við grønari markering.



6. Øki til vegagerð, byggipláss og grótgoymslu ísv tunnilslinju 2B. IBA øki er blátt.

2B-2 Grótgoymsla

Fyri at kunna samanbera linjuføringarnar verður tikið útgangstøði í eini grótgoymslu í Traðardali omanfyri landsvegin. Eftirsum økið liggur omanfyri Sands vatn, mugu bassin gerast til botnfall av skitnum yvirflatuvatni, áðrenn tað rennur í ánna og Sands vatn. Hendan loysnin varð brúkt ísv grótgoymsluna í Sandoyartunnilin. Økið til grótgoymslu er víst á mynd 6 við gulari markering.

Økið til grótgoymslu er størri enn tann í Djúpadali, tí økið í Traðardali er flatari, og harvið loyvir minni hædd, um grótgoymslan skal byggjast inn í lendið. Eisini fer minni av gróti fer til vegagerð.

2B-3 Byggipláss norðanfyri Múlan

Teknað er eitt byggipláss við tunnilsmunnan á uml 12.000 kvm og restin av byggiplássinum, uml 38.000 kvm, í grótgoymsluni. Tað er mett avbjóðandi at hava eitt byggipláss til ein so langan undirsjóvartunnil beint við Sands vatn, serliga ísv yvirflatuvatn og støv, evju og runu. Roknast má við arbeiðsvegi millum lítla byggiplássið og grótgoysmluna. Økið til byggipláss er víst á mynd 6 við reyðari markering.

2B-4 Byggipláss í Skúvoy

Við tunnilsmunna norðanfyri Sands bygd, gerst undirsjóvartunnilin so langur, at mett verður neyðugt at byggja úr Skúvoy eisini, fyri at longdin frá tunnilsmunna til arbeiðsstaðið í tunlinum ikki verður munandi longri enn royndir eru við. Av tí at talan er um byggipláss á útoyggj og tá talan er um brimpláss, er í avgerðarnotatinum frá 20.10.2025 nágreinað serliga væl, hvat er neyðugt av plássi, útgerð og anleggum. Neyðugt er við einum rímiliga umfatandi byggiplássi og nøktandi fyribils havn í Skúvoy við verjugróti, so tunnilsgrótið kann siglast burtur. Til fyllugrót í fyrsta part av molanum verður í fyrstu syftu neyðugt við uml. 70.000 kbm úr Sandoynni, sum mugu koyrast til og avskipast úr Sands havn. Um loyvi fæst, kann sum alternativ gerast eitt grótbrot í Skúvoy. Neyðugt verður væntandi at spreingja ísv dýping, so grótbátarnir kunnu leggja at í havnini. Roknað er ikki við at tyrva grótið út á sjógv. Byggiplássið er markerað við reyðum liti.




7. Byggipláss í Skúvoy ísv tunnilslinju 2B og 2C. Ramsarøkið er grønt og IBA økið, fjørðan, er blá

2C Tunnilsmunni sunnanfyri Múlan

2C-1 Vegaloysn

Vegaføringin uttanfyri tunnilsmunnan krevur eina ávísa geometri sambært vegareglunum, við frástøðum, radius o.l. fyri at binda verandi veg í tunnilsvegin. Uppteknað er ein møgulig loysn, sum verður mett at lata seg gera. Víst verður á, at mett verður neyðugt at spreingja burtur rímiliga stóran part av rygginum millum Nykurstjørn og Sands Vatn, fyri at fáa nøktandi vega geometri í mun til vegareglurnar.

Fyri at kunna samanlíkna við hini alternativini, er teknaður ein vegur norður um Múlan, so høvuðsferðslan sleppur undan svingunum við Kálvs Rætt í hesum uppskotinum eisini. Undir øllum umstøðum verður av anlegstekniskum orsøkum tilmælt at gera ein arbejðsveg upp um Múlan og norður til høvuðsbyggiplássið og grótgoymsluna. Í hesi loysnini kann framtíðar vegurin til eysturbygdirnar leggjast niðanfyri húsini eins og uppteknað í 1A-5a, og økið, sum fer til samlaða vegin frá Líðarenda til meginskúlan verður tilsvarandi.



8. Øki til vegagerð, byggipláss og grótgoymslu ísv tunnilslinju 2C. IBA øki er blátt.

2C-3 Grótgoymsla

Grótgoymslan verður skipað eins og 2B-2 við somu grundgevingum. Sí mynd 6.

2C-4 Byggipláss

Byggiplássið verður skipað á sama hátt, sum 2B-3 við uml.12.000 kvm við tunnilsmunnan og restini í grótgoymsluni, sí mynd 6 og 8.

2C-5 Byggipláss í Skúvoy

Byggiplássið og fyribils havnarlag í Skúvoy verður skipað sum 2B-4, sí mynd 7

Yvirlit yvir víddir og náttúru

Ávirkað øki		IBA [m^2]	Ramsar [m^2]	Samlað [m^2]	Frágreiðing um økið, slag av náttúru, plantur, fuglur og vatnrensl.
1A Tunnilsmunni í Djúpadali					
1A-1	Byggiplass í Djúpadali	23.300	-	49.300	Sí viðfesti 1 Sandoy
1A-2	Byggiplass til tunnil gjøgnum Traðarhamar/Sands Líð	-	-	12.000	Ongin áriniskanning er gjørd í økinum. Fuglaskrásetingar eru gjørdar í økinum. Sí viðfesti 3 Sandsvatn.
1A-3	Tunnilsvegur, Djúpidalur - Sandslíð	52.585	-	89.300	Sí viðfesti 1 Sanoy: 1A3
1A-4	Grótgoymsla í Djúpadali	47.800	-	78.300	Sí viðfesti 1 Sandoy: 1A3
1A-5a	Vegaføring gjøgnum Sandslíð og Sands bygd	52.900	-	83.300	Bert økið við Múlan er kannað. Sí viðfesti 1 Sand: 1A5a.Ongin áriniskanning er gjørd í økjunum, sum gongur í gjøgnum Sandsbygd og Sandslíð.Fuglaskrásetingar eru gjørdar í økjnum. Sí viðfesti 3 Sandsvatn og viðfesti 4 Gróthúsvatn.
1A-5b	Vegaføring gjøgnum Traðarhamar norður um bygdina	42.200	-	104.200	Ongin áriniskanning er gjørd í økjunum.
1A-5c	Vegaføring eftir Traðarhamri	48.400	-	226.900	Ongin áriniskanning er gjørd í økinum
1A-6	Tunnilsmunni í Skúvoy	-	4.700	4.700	Sí viðfesti 2 Skúvoy
2B Tunnilsmunni norðanfyri Múlan					
2B-1	Vegaloysn uttanfyri tunnilsmunnan	16.600	-	16.600	Bert økið við Múlan er kannað. Sí viðfest 1 Sand: 1A5a. Restin av økinum er ikki kannað.
2B-2	Grótgoymsla	-	-	142.250	Ongin áriniskanning er gjørd í økinum.
2B-3	Byggiplass norðanfyri Múlan	16.800	-	54.500	Ongin áriniskanning er gjørd í økinum.
2B-4	Byggiplass í Skúvoy	-	92.000	92.000	Bert ein partur av økinum er kannað viðvíkandi plantuvøkstur. Sí viðfesti 2 Skúvoy. Fuglur: fugladata er fingið frá Tjósavninum í 2025. Tó erur tølini fyri lunda og teista metingar frá Umhvørvisstovuni. Sí viðfesti 2 Skúvoy
2B-5	Framtíðar vegur til Eysturbygdirnar	52.900	-	83.300	Bert økið við Múlan er kannað. Sí viðfesti 1 Sand: 1A5a.Ongin áriniskanning er gjørd í økjunum, sum
2C Tunnilsmunni sunnanfyri Múlan					
2C-1	Vegaloysn uttanfyri tunnilsmunnan	42.800	-	50.200	Bert økið við Múlan er kannað. Sí viðfest 1 Sand: stk 1A5a.Ongin áriniskanning er gjørd í økjunum, sum gongur í gjøgnum Sandsbygd. Fuglaskrásetingar eru gjørdar í økinum. Sí viðfesti 3 Sandsvatn og viðfesti 4 Gróthúsvatn.
2C-2	Grótgoymsla	-	-	142.250	Ongin áriniskanning er gjørd í økinum.
2C-3	Byggiplass norðan- og sunnanfyri Múlan	12.400	-	50.100	Ongin áriniskanning er gjørd í økjunum.
2C-4	Byggiplass í Skúvoy	-	92.000	92.000	Bert ein partur av økinum er kannaður viðvíkandi plantuvøkstur. Sí viðfesti 2 Skúvoy. Fuglur: fugladata er fingið frá Tjósavninum í 2025. Tó erur tølini fyri lunda og teista metingar frá Umhvørvisstovuni. Sí viðfesti 2 Skúvoy
2C-5	Framtíðar vegur til Eysturbygdirnar	10.100	-	33.100	Bert økið við Múlan er kannað. Sí viðfesti 1 Sand: 1A5a.Ongin áriniskanning er gjørd í økjunum, sum gongur í gjøgnum Sandsbygd og Sandslíð.Fuglaskrásetingar eru gjørdar í økjnum. Sí viðfesti 3 Sandsvatn og viðfesti 4 Gróthúsvatn.

Umhvørvi og ávirkan

Sí annars viðfesti 5

Viðmerkjast skal, at hettar er ikki ein endalig frágreiðing og viðgerð.

Viðvíkjandi Sands vatni, sí viðfesti 3

Viðvíkjandi Grótshúsvatn og Nykurstjørn, sí viðfesti 4

Fuglar.

Á økjunum reiðraðust fleiri fuglasløg.

Við vegin við Stóravatn

Við vegin við Stóravatn áttu 12 sløg av fuglum – Tjaldur *(Haematopus ostralegus)*, Stelkur *(Tringa totanus)*, Lógv *(Pluvialis apricaria)*, Spógvi *(Numenius phaeopus)*, Svarthálsa *(Charadrius hiaticula)*, Mýrisnípa *(Gallinago gallinago)*, Svartbakur *(Larus marinus)*, Helsareyði *(Phalaropus lobatus)*, Stari *(Sturnus vulgaris)*, Steinstólpa *(Oenanthe oenanthe)*, Summartítlingur *(Anthus pratensis)*, Grátítlingur *(Anthus petrosus)*. Sí viðfesti 1.

Í Djúpadali

Í Djúpadali skrásettu vit 4 sløg at eiga - Tjaldur *(Haematopus ostralegus)*, Spógvi *(Numenius phaeopus)*, Mýrisnípa *(Gallinago gallinago)*, Kjógvi *(Stercorarius parasiticus)*.

Múlin Við Kálvamannsrætt

Á Múlin Við Kálvamannsrætt áttu 6 sløg - Tjaldur *(Haematopus ostralegus)*, Spógvi *(Numenius phaeopus)*, Tangspógvi *(Numenius arquata)*, Mýrisnípa *(Gallinago gallinago)*, Kjógvi *(Stercorarius parasiticus)*, Steinstólpa *(Oenanthe oenanthe)*, Summartítlingur *(Anthus pratensis)*. Sí viðfesti 1.

Økið í Skúvoy

Við økið í Skúvoy áttu 13 sløg - Tjaldur *(Haemotopus ostralegus)*, Spógvi *(Numenius phaeopus)*, Lógv *(Pluvialis apricaria)*, Mýrisnípa *(Gallinago gallinago)*, Kjógvi *(Stercorarius parasiticus)*, Skúgvur *(Stercorarius skua)*, Terna *(Sterna paradisea)*, Steinstólpa *(Oenanthe oenanthe)*, Summartíttlingur *(Anthus pratensis)* Grátíttlingur *(Anthus petrosus)*, Villdunna *(Anas platyrhynchos)*, Teisti *(Cepphus grille)* og Lundi *(Fratercula arctica)*. Sí viðfesti 2.

Ávirkan á Fuglar

Talan er mest um vanligu føroysku heiðafuglarnar. Men nøkur av sløgunum eru sjáldsamir (t.d. stelkur, tangspógvi, svarthálsa og helsareyði). Eisini eru fleiri av fuglasløgunu, ið eru skrásett við Stóravatn, í Djúpadali, við Múlan og í Skúvoy á tí føroyska reyðlistanum, sí viðfesti 6.

Reyðlistin er enn ikki alment góðkendur, men vanligt er at nýta hann í sambandi við kanningar í Føroyum. Somuleiðis eru fuglar, sæddir í kanningini, fevndir av Bonn sáttmálanum, sí viðfesti 4. Meðan reyðlistin tekur støði í støðuni í Føroyum, tekur Bonn sáttmálin støði í støðuni hjá hesum fuglum í teimum økjum/londum, sum fuglarnir ferðast millum. Sáttmálarnir seta krøv til okkara um at ansa eftir og halda eyga við gongdini hjá hesum fuglum.

Viðvíkjandi fuglum eru høvuðstrupulleikarnir, ið kunnu stinga seg upp orsakað av vegagerð, hesir: ljóðdálking, órógv undir bygging, missur av lendi at halda til í og økt ferðsla. Økt ferðsla skapar órógv og økir eisini um vandan fyri, at fuglur verður yvirkoyrdur.

Tað er kent, at bæði ferðsla, larmur og fólk kunnu styggja fugl (Smith & Visser, 1993; Reijnen & Foppen, 2006; Francis et al, 2009; Polak and Polak, 2024). Sambært Ware et al, 2015 er tað serliga larmurin/ljóðið,

ið órógvar og styggir. Samband er millum, hvussu nógv minking verður staðfest og hvussu nógv ferðsla/larmur er (t.d. Reijenen et al, 1996; Dooling & Popper, 2007 & Ware et at, 2015; Jaroslaw, 2023). Tað er tó ringt at samanbera nevndu kanningar við hesa ætlan, tí nevndu kanningar umfata ferðslu við nógvum 1000 bilum um dagin – eisini 100 túsund.

Samanlagt kann tað síggja út sum, at vegir við ferðslu ikki ávirka, men tað er tí at ferðslan kann ávirka fugl ymiskt; allir fuglar flýggja ikki undan ferðsluni. Hetta finna Kroeger et al (2022) í eini meta analysu av kanningum viðvíkjandi ávirkan av vegum/ferðslu á fugl.

Pálsdóttir et al, 2025 hava kannað ávirkan frá munandi minni ferðslu í Íslandi - frá nøkur hundra akfør um døgnið upp til 16.660 bilar um døgnið. Úrslitini vístu, at summir fuglar (t.d. spógvi, lógv og summartíttlingur) ikki trivust væl tætt við vegin. Aðrir fuglar vístu seg ikki hava ampa av vegnum (t.d. mýrisnípa og stelkur).

Birdlife International metir at Sandoyggin er verd at varðveita vegna sítt fuglamargfeldi (Bildlife.org). Sandoyggin hýsir einum lutfallsliga stórum parti av føroyska helsareyða-stovninum og eisini spógva (Hansen 2003). Hesi sløgini eru bæði á reyðlistanum, helsareyði (sera hóttur) og spógvi (viðbrekin), ið eisini hevur týdning fyri evropeiska stovnin (Hansen, 2003). Stelkur og svarthálsa eru sjáldsom í føroyum og á reylistanum, bæði sera hótt. Tað finnast bert upp til 30 pør av helsareyða, stelki og svarthálsu í Føroyum (Olofson og Pálsdóttir, 2022). Spógvi, helsareyði og svarthálsa eru at meta sum viðbrekin yvirfyri ferðslu og gangi (t.d. Pálsdóttir et al, 2025 og Tratales et al, 2021). Sum nú er, er sera lítil ferðsla á Skarvanesvegnum, men væntast sambært forsagnum (RAD) at økjast til 1400 bilar um døgni, eftir at tunnilin er gjørdur. Hettar er ein munandi øking. Tí kunnu hesi sløg minka fram við vegnum. Pálsdóttir et al, 2025 funnu ikki, at stelkur var viðkvæmur yvur fyri ferðslu (ella helt seg vekk) í teirra kanning, ein orsøk kann vera, at vøksturin tætt við vegin var væl egnaður hjá stelkið at reiðrast í.

Múlin

Á Múlanum reiðraðist tangspógvi, ið er sera hóttur. Evropeiski stovnurin er minkaður 42 % síðani 1980 (Olofson og Pálsdóttir, 2022). Viðmerkjast skal, at sera nóg fuglasløg eru skrásett báðu megin Múlan – Sandsvatn (98 sløg) og Gróthúsvatn (77 sløg), sí viðfesti 3 og 4.

Skúvoy

Viðvíkjandi Skúvoy, so er ein av loysnunum at borða frá Skúvoy. Hettar viðførir, at eitt øki sunnan fyri ánna og yvir til kirkjugarðin, bæði oman- og niðan fyri vegin og oman á sjógv, verður tikið til arbeiðspláss, goymslu og annað. Avleiðingin av hesum verður, at fuglurin í bakkanum og fjøruni – mest lundi og teisti – missir reiðurspláss, tí bakkin verður oyðilagdur. Um arbeitt verður í bútíðini ella ikki, kemur ikki at hava nakran týdning, av tí at økið har fuglurin reiðrast verður tikið. Fyri fugl í haganum yvir økinum, kann tað hjálpa, at ikki fremja arbeiði við nógvum gangi í bútíðini. Kjógvi (nærum hóttur) reiðrast 200-300 metur frá, har sum tunnilin kemur upp. Hettar kann møguliga ávirka kjógvan, sum er minkaður í tali seinastu árini (t.d. Olsen et al, 2024). Eisini aðrir hagafuglar sum t.d. lógv og spógvi reiðrast líka nær við ætlaða tunnilsmunnan. Tí er sannlíkt, at gangur frá arbeiðinum styggir nakað av fugli burtur. Smáfuglar, t.d. summartíttlingur, eiga nærri við og kunnu somuleiðis styggjast (t.d Pálsdóttir et al, 2025). Sí eisini viðlegg 2.

Tunnilsmunni norðan ella sunnan Múlan.

Vit hava ikki kannað arbeiðs- og grótgoymsluplás í samband við møguliga tunnilsgerð sunnan og norðan Múlan. Hettar økið liggur tætt at Sandsvatni, ið Umhvørvisstovan ynskir at friða. Hesum viðvíkjandi er tað ikki óhugsandi, at tilfar fer at renna frá arbeiðsplássum og grótgoymslum í Sandsvatn. Tað kann viðføra dálking av Sandsvatni.

Eftir Traðarhamri ella gjøgnum Traðarhamar.

Hendan ætlan kemur nær Sandsvatni. Sum áður nevnt, hevur Sandsvatn stórt margfeldi av fuglalívi, sí viðfest 3. Helsareyði reiðrast við vestara/norðara enda á Sandsvatni. Vegagerð nær vatninum kann tí koma, at órógva fuglalívi við Sandsvatn.

Plantur

Flestu plantusløgini í økjunum (við Múlan, við Stóravatn, í Djúpadali og í Skúvoy) eru skrásett sum sera vanlig, ella vanlig, og hesi plantusløgini eru tí ikki í vanda fyri at verða týnd.

Við Múlan, við Stóravatn, í Djúpadali og í Skúvoy vóru fleiri plantusløg skrásett at vaksa her og har, har fleiri av hesum eru vátlendisplantur. Plantusløg, ið vóru skrásett av vera sjáldsom, vóru funnin í Djúpadali og við Stóravatn. Bæði við Stóravatn og í Skúvoy vóru funnin plantusløg skrásett sum sera sjáldsom. Hesi plantusløgini eru á tí føroyska reyðalistanum, og eru tí sera hótt.

Vegagerð (1A: 3,5a,5b,5c,6, 2B: 1,4 og 2C: 1,4)

Hvussu lendið verður fráfarið, er av alstórum týdningi fyri vøkstur, skordjór og fuglar. T.d. eigur innfluttur vøkstur/fræ ikki at verða brúktur til at gera nýggjan vegjaðara, tí hetta kann hava við sær innflutning av ókendum og kanska innræsnum plantu- og djórasløgum.

Tá eingin vitan er um, hvørt hesi nýggju plantusløgini fara at vaksa/trívast í økinum, er tað torført at meta um, um hesi sløgini kunnu týna verandi vøkstur og harvið minka um margfeldið í økinum við tíðini. Tí má havast í huga, hvørji nýggj plantusløg verða tikin inn í økið, fyri ikki at broyta verandi vøkstur.

Grótgoymsla og arbeiðsplass (1A: 1,2,4,6, 2B: 2,4 og 2C: 2,3,4)

Í samband við hesa verkætlana, verða øki nýtt til grót- og mold goymslu, eins og lendi skal brúkast til arbeiðsøki. Hetta ger, at verandi lendi hvørvur, og harvið tey plantu- og djórasløg, ið liva í økjunum. Fuglarnir flyta úr hesum økjum, og mugu finna sær annan bústað. Eisini verður vøksturin, ið fer undir grót, mold og har, ið arbeiðsøkini vera, týndur. Um man velur at sáa annan vøkstur í lendið eftir arbeiðslok, kann ein vandi verða, at hesi plantusløg kunnu breiða seg, og tí týna núverandi vøkstur í økinum.

Vatnrenslið í lendinum.

Teir lívrunnu og ólívrunnu eginleikarnir í jørðini hava alstóran týdning fyri varðveitslu av djóralívi og vøkstri í einum og hvørjum lendi. Somuleiðis hevur tað týdning, at verandi landslag verður varðveitt í størsta mun gjørligt. Við hesum verða atlit tikin at varðveitslu av liviháttinum hjá vøkstri, skordjórum og fuglum.

Tá ið inntriv verða gjørd í føroysku náttúruna, er varðveitsla av verandi vatnrensli av alstórum týdningi. Broytt vatnrensl kann ávirka samansetingina av plantusløgun. Um vátøki gerast turrari, hevur hetta við sær, at fleiri turrlendisplantur fara at inntaka økið og vátlendisplantur bukka undir. Hetta broytir lívfrøðiliga margfeldið í økinum.

Larmur.


Yvirhøvur vísa royndir, at nógvur larmur og ferðsla styggir fleiri fuglar burtur, so bæði reiðring og uppihald í rakta økinum minkar. Jaroslaw, 2023 fann, í síni kanning av órógvi á fugl, at tá ljóðið var minka til 50-55 desibeel (150 m vekk frá kelduni) so vaks fuglameingi aftur. Nógv ferðsla kann ávirka heilsuna hjá fuglum, ið halda til tætt við órógvið (Ware et al, 2025). Hetta tí at órógvið fær fuglarnar at hugsavna seg um at hyggja eftir møguligum hóttanum, heldur enn at eta. Tí lætna fuglarnir og gerast minni mótstøðuførir móti sjúku og ringum veðri.

Økisvernd

Nevnast skal eisini, at Umhvørvisstovan arbeiðir við økisvernd í Skúvoy og Sandoynni. Í Sandoynni snýr tað seg um eitt samanhangandi øki kring vøtnini á Sandi.

Tað er viðkomandi at fylgja bæði fuglalívinum og plantulívinum í økjunum í nøkur ár fram, til tess at vita, um útbreiðslan av fuglum og plantulívið í nærumhvørvinum broytist.

Í hoyringsskrivinum frá Umhvørvisstovuni, 13.12.2024 sæst yvirlit yvir friðingaráhugaverd økir:



Mynd 1. Heildarkort yvir økir við serligum náttúruvirðum í Sandoynni



Mynd 2. Heildarkort yvir økir við náttúruvirðum í Hvalba

Lýsing og árinsmeting av ymisku linjuføringunum

Í samband við ætlan hjá Tunnilsfelagnum um at gera ein undirsjóvartunnil til Suðuroyar fyriliggja trý uppskot um linjuføringar 1A, 2B og 2C.

Linjuføring 1A

Í uppskoti 1A verður farið niður í Djúpadali, við tunnil upp í Skúvoy.

Í linjuføring 1A eru trý uppskot um vegaføring á Sandoynni: tvey uppskot eystan (1A-5b og 1A-5c) fyri Sandsvatn og eitt uppskot vestan (1A-5a) fyri Sandsvatn.

Vegaføring 1A-5a vestanfyri Sands Vatn

Vegaføring vestanfyri Sandsvatn (1A-5a) byrjar norðan fyri Múlan og upp um Múlan við íbinding sunnan fyri Múlan í núverandi landsveg. Eitt nýtt vegastrekki verður gjørt (sí mynd 2), ið fer ígjøgnum landbúnarøki (sláttubø) við íbinding í vegastrekkið, sum gongur í gjøgnum Sandafløttu og víðari eftur Sandslíð. Vegastrekkið sunnan fyri Múlan kemur nær at Sandsvatni, eins og roknast kann við einari munandi øking av ferðsluni eftur at arbeiðið er liðugt – tað kann hava árin á fuglalívið á Sandsvatni. Nevnast skal, at niðan fyri verandi vegastrekkið, ið gongur eftur Sandafløttu liggja Mølheyggjarnir, ið eru friðaðir.

Sandsvatn hevur eitt tað stórsta margfeldi av fugli í Føroyum, sambært skrásetingum (sí viðfesti 3). Talan er mest um nýtslu (hvíldarøki, uppihald) uttanfyri bútíðina hjá hesum fuglasløgum. Vestanfyri vegaføring 1A-5a (sunnanfyri Múlan) liggja Gróthúsvatn og Nyktjørn. Hesi vøtnini eru, eins og Sandsvatn, týdningarmikil fuglaøki á Sandi (sí viðfesti 4). Helsareyði er skrásettur at reiðrast við Gróthúsvatn. Helsareyði er á reyðlistanum í hóttanarbólki CR (sera hóttur).

Vegaføring 1A-5b eystan fyri Sandsvatn

Henda veðaføring gongur tætt fram við Sandsvatn við tunnil í gjøgnum Traðarhamar. Eisini fer vegurin tvørtur um Dalsá, ið rennur út í Sandsvatn. Økið, har ætlan er at leggja vegin, er bæði haga- og dyrkað lendi (landbúnaðarøki).

Ongar kanningar eru gjørdar í økinum. Tó er helsareyði, skrásettur í øðrum fuglateljingum, at reiðrast við økið millum norðara enda á Sandsvatni og Meginskúlan.

Vegaføring 1A-5c eystan fyri Sandsvatn

Vegaføringin liggur norðan fyri Sandsvatn og gongur upp á Traðarhamar. Økið er hagalendi, og í økinum liggja eisini tvey vøtn. Vegagerðin til hesa farleið kemur ikki tætt at Sandsvatni. Eingin kanning er gjørd av økinum viðvíkandi hesari vegaføring. Einki data fyriliggur sum nú er.

Hvørki grótgoymslur ella arbeiðspláss til hesar linjuføringar koma at liggja við Sandsvatn ella við Stóravatn og koma tí ikki hava nakað árin á vøtnini.

Vegaføring frá Líðarenda til Djúpadal 1A (a-c)

Allar vegaføringarnar í uppskot 1A (a-c) fara fram við Stóravatni og oman í Djúpadal. Við Stóravatn, er nógv vátlendi. Í økinum er stórt margfeldi av fugli. Eisini reiðrast sjáldsamir reyðlistaðir fuglar í økinum t.d. stelkur (CR). Í støðum er vøksturin við Stóravatn vátlendisgróður. Reyðlistaðar plantur eru eisini skrásettar við- og í Stóravatni t.d. hjartatjarnaks, sum er í hóttanarbólkinum VU (viðbrekin).

Linjuføring 2B

Her er talan um, at tunnilin fer inn norðan fyri Múlan. Eisini verður í hesi linjuføring borað frá Skúvoy. Vegaføringingin kemur at liggja tætt at Sandsvatni (núverandi landsvegur). Hendan ætlanin inniber eisini grótgoymslur og byggipláss, ið koma at ligga nær við Sandsvatn. Hetta kann viðføra, at tilfar frá tunnilsgerini kann renna út í Sandsvatn.

Linjuføring 2C

Í hesar linjuføring gongur tunnilin niður sunnanfyri Múlan, og eins í 2B verður borað úr Skúvoy. Henda ætlan inniber, eins og linjuføring 2B, arbeiðspláss og grótgoymslur nær við Sandsvatn við somu vandum, tó við meira vegaføring fram við Sandsvatni. Um núverandi vegur verður nýttur sum arbeiðsvegur, kann væntast, at nógv tung ferðsla kemur at koyra tætt við Sandsvatn í arbeiðstíðini, og at vanliga ferðslan kemur at økjast munandi eftir at arbeiðið er liðugt. Eisini viðførir henda ætlan, at stórur partur av økinum millum Sandsvatn og Gróthúsvatn/Nyktjørn verður tikin burtur - hettar til arbeiðspláss og tunnilsmunna.

Skúvoy

Linjuføring 1A

Við linjuføring 1A verður tunnil boraður til Skúvoyar. Eitt lítið byggipáss verður í Skúvoy til geran av inntaki til tunnilin, og vegagerð. Henda loysnin er ikki so umfatandi, sum loysn 2B og 2C, og kemur tí ikki at hava so stórt árin á fuglalívið í Skúvoy. Tó kann nevnast, at í arbeiðstíðini kann órógv av ljós- og ljóðdálking koma fyri, ið kann órógva fuglin. Um arbeiðið verður væl tilrættalagt, kann minkast um hetta órógv, við at tað ikki verður arbeitt í bútíðini hjá búfuglinum.

Linjuføring 2B og 2C

Sambært linjuføring 2B og 2C er sum nevnt, ætlanin at borða frá Skúvoy. At bora frá Skúvoy inniber, at eitt stórt øki sunnan Skývoyar bygd verður tikið til m.a. arbeiðspláss, atløgu og vegagerð, bæði á landi og sjógvi. Harafturat er ætlanin at goyma stórar nøgdir av tunnilsgróti á sjónum uttanfyri økið, sí mynd 7.

Hettar viðførir m.a. at fjøran og bakkin sunnan fyri bygdina verða oyðiløgd. Við bakkanum fara lundaholurnar og reiðurplássini hjá teistum og øðrum fugli, ið reiðrast í fjørðuni. Hettar kann tí hava varðandi árin á náttúruna. Eisini verður nógv órógv í arbeiðstíðini av t.d. ljós- og ljóðdálking.

Skúvoyggin er Ramsar- og IBA øki, vegna sítt ríka fuglalív. Hugsandi er, at tunnilsarbeiðið í 2-3 ár fer at styggja fuglin (ljóð og ljósdálkin), ið búleikast í økinum. Ilt er at meta um útlitini hjá fugli, um fuglurin kann nýta økið aftur, tá arbeiðið er liðugt. Í løtuni arbeiðir Umhvørvisstovan eisini við økisfriðing í Skúvoy.

Meting

Sum nevnt hava linjuføringar 2B og 2C avleiðingar fyri náttúruna við Sandsvatn, Gróthúsvatn og Nyktjørn. Harafturat hava hesar linjuføringar stóra ávirkan á Skúvoynna.

Linjuføring 1A-5a hevur somu avleiðingar sum 2B og 2C hava fyri náttúruna á Sandi. Henda linjuføring hevur tó minni ávirkan á náttúruna í Skúvoy enn linjuføring 2B og 2C.

Linjuføring 1A-5b ger seg inn á Sandsvatn, tí vegurin fer tætt framvið økið norðan fyri Sandsvatn og fram við Sandsvatni. Ávirkan á Skúvoy er tann sama sum í 1A-5a.

Linguføring 1A-5c kemur ikki nær Sandsvatni. Ávirkan á Skúvoy er tann sama sum í 1A-5a.

Vøtnini á Sandoynni tvs Sandsvatn, Gróthúsvatn, Nyktjørn og Stóravatn og eru týdningarmikil fuglaøki, og eru avgerðandi fyri IBA metingina av økinum í Sandoy. Somuleiðis er Skúgvoyggin útnevnd Ramsar- og IBA øki vegna ríka fuglalívið. Harafturat hevur Umhvørvisstovan – sum nevnt - ætlanir um økisfriðing av Sandsvatni og Skúvoy.

Linjuføringar 1A (a-c) fara fram við Stóravatni og kunnu sum nevnt órógva náttúruna har. Tí er týdningarmiki við eini linjuføring, ið tekur sum mest atlit at hesum økjum.

Ein møguleiki er t.d. ein farleið eystan fyri Sandsvatn, ið liggur nakað longur burtur frá vatninum, enn núverandi leið 1A-5b vísur, og tí ikki órógvar Sandsvatn eins nógv. Henda farleið kann so bindast í økið norðan fyri Lítlavatn, og ein vegaføring gerast oman til Djúpadal. Á henda hátt verða Stóravatn, Sandsvatn, Gróthúsvatn, Nyktjørn og vátøkir ávirkað sum minst. _Farleiðin er nevnd 1C á síðu 6.

Við linjuføring 1A, hevur tunnilsgerð/boring til Skúvoy, nógv minni árin á umhvørvið í oynni enn linjuføring 2B og 2C, ið krevja stórt byggipláss og harvið størri lendistøku.

Nevnast skal, at við linjuføring 1A-5b og 1A-5c er tað tó neyðugt at kanna viðkomandi økið eystanfyri Sandsvatn fyri at finna bestu loysnina.

Í hesari meting av hvør leið ger seg minst inn á náttúruna verður atlit tikið til ta vitan, sum er til taks, friðingar og tær ætlanir, ið eru um friðingar.

Skjalayvirlit

Viðfesti 1 Sandoy

Viðfesti 2 Skúvoy

Viðfesti 3 Sandsvatn

Viðfesti 4 Gróthúsvatn

Viðfesti 5 Samandráttur

Viðfesti 6 Vandametingar

Viðfesti 7 Trafiktal på Sandoy